gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Skjúttarnir eru sterkir

**Síðani bogaskjúttarnir fóru at umboða Føroyar á Oyggjaleikunum, hava heiðursmerkini verið fleiri í tali**

BOGASKJÓTIN
*Jákup Mørk*

Bogaskjótin telist millum tær greinar, sum eru komnar upp í føroysku oyggjaleikasøguna, eftir at fyrstu partarnir av hesari vórðu skrivaðir.

Fyrstu ferð at Føroyar tóku lut í bogaskjóting var á Álandi í 1991, og úrslitið ta ferðina varð eitt bronsumerki í recurve, sum Jan Rubeksen hevði við sær heimaftur.

## Compound munaði

Á Isle of Wight gekk ikki eins væl, men á Gibraltar í 1995 kom broyting í. Skjótast kundi nú eisini í compund, og tað tóktist skjótt greitt, at hetta hóvaði føroyingum munandi betri.

Síðani hetta varð gjørt, hevur talan á hvørjum ári verið um fleiri heiðursmerki. Ringt er at taka nakran framum, men tað skerst tó ikki burtur, at hjúnini, Sigrid og Schandorff Vang, hava gingið aftur á hvørjum ári.

Tey bæði eru eisini við á liðnum í ár, men sjálv heldur Sigrid, at tað mest er av neyð hjá henni. Seinastu tíðina hevur hon nýtt nógva orku til skúlan, og tískil hevur hon ikki fingið gjørt eins nógv við venjingina. Hinvegin skal eitt konufólk vera við, um talan skal gerast um liðkapping í compound, og tá menninir aftur tykjast sera sterkir, helt Sigrid tað vera spell, um teir ikki sluppu at luttaka í hesari.

Í recurve hevur talan ikki verið um somu sigursgongd sum í compound, men føroyingar eru tó eisini við í hesum partinum. Spennandi verður at vita, hvørt hetta eisini kann gerast eitt øki, har føroyingar fara at seta seg á trúnuna komandi Oyggjaleikaárini.

Lítið er at ivast í, at bogaskjúttar okkara aftur í ár fara eftir metalli, og helst skal tað vera úr gulli. Eitt annað er so, um hetta eisini verður úrslitið tá avtornar, men hagtølini fyri bogaskjóting eru í øllum førum hugnaligur lesnaður.


Scandorff Vang


Sigrid K. Vang


Albert E. Dam


Per Holm Andersen


Poul Martin Joensen


Hans Petur Højgaard


Annlott Rasmussen


Bjarne Rasmussen

### Úrslit í bogaskjóting á Gotlandi ’99

| | | |
|---|---|---|
| Gull: | Schandorff Vang | Compound |
| | Liðkapping | Compound |
| Silvur: | Per Holm Andersen | Compound |
| | Sigrid Vang | Compound |

# Vónir til útisetan


Elinborg Nygaard


Maria Petersen


Rókur Nielsen


Kjartan Eli Hentze


Bergur Jacobsen


Petur Niclasen


Finnbjørn Zachariasen

**Borðtennis er ikki greinin, sum Føroyar hava staðið seg best í gjøgnum árini, men onkun tíð hevur ein vørrur tó verið gjørdur**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk*

Hóast Føroyar longu fleiri ferðir hava tikið lut í borðtenniskappingini í Oyggjaleikahøpi, so er hetta ikki ítróttargreinin, har flestu heiðursmerkini eru vunnin.

Ein lítil vend tóktist tó at vera íkomin, tá Føroyar í 1997 fóru til Jersey at kappast. Við á liðnum ta ferðina var útisetin, Kjartan Eli Hentze, og tað skuldi skjótt vísa seg, at hann var ein veruligur styrkur hjá liðnum.

Kjartan Eli spældi seg heilt fram til finaludystin, har hann tó mátti lúta fyri tí sera sterka Charles Prean av Isle of Wight. Prean telist millum sterkastu leikararnar í heiminum, og vanliga umboðar hann Bretland, tá kappingar eru á skránni, men eins og hjá Kjartan Eli gera ættarbondini, at hann kann taka lut á Oyggjaleikunum.

Á Gotlandi í 1999 gekst ikki eins væl í einmansleikinum hjá Kjartani Eli, men hinvegin komu Føroyar tá fram til hálvfinaluna í tvímansleiki hjá monnum, har Kjartan Eli og Hans Hammer tó máttu lúta fyri seinnu vinnarunum av Gotlandi.

Akkurát hvussu úrtøkan fer at vera hesaferð, er eitt sindur ilt at meta um. Ikki minst, tí tað avhongur rættiliga nógv av, hvat fólk hini londini hava tókt til dystirnar.

Úrslitini tær báðar seinastu ferðirnar hava tó víst, at borðtennisavrikini hjá Føroyum eru í framgongd. Ikki bert orsakað av tilgongdini av Kjartani Eli, men eisini tí miðvís venjing tykist hava lyft støðið á heimligu leikarunum.

Hvørt hetta verður nóg mikið til enn einaferð at tryggja okkum heiðursmerki, er óvist, men ivaleyst verður talan um enn eina spennandi kapping fyri føroysku borðtennisítróttina.

### Heiðursmerki í borðtennis á Gotlandi ’99

| | |
|---|---|
| Bronsa: | Hans Hammer/<br>Kjartan Eli Hentze tvímansleikur |

gult15 cyan15 magenta15 svart15



# Svimjingin á einum vegamóti

**Eftir fleiri ár við framúr góðum úrslitum á svimjiøkinum, tykjast útlitini til komandi Oyggjaleikir ikki eins góð, sum tey onkun tíð hava verið**

SVIMJING
*Jákup Mørk*


Kristian Martin Joensen

Tey árini, sum Føroyar hava tikið lut á Oyggjaleikum, hava føroysku svimjararnir altíð talst millum teirra, sum hava gjørt mest vart við seg.

Heiðursmerkini hesi árini hava verið nógv í tali, men nú er kanska líkt til, at ein minking av heiðursmerkjatalinum er ávegis.

## Breiddin ov lítil

Ikki tí. Millum luttakararnir á komandi oyggjaleikunum eru fleiri, sum áður hava vunnið nógv, og sum vónandi eisini fara at gera tað hesaferð, men hinvegin skerst ikki burtur, at breiddin í føroyskari svimjing er minkað munandi seinnu árini.

Hetta er eisini nakað, sum nýggi landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti, segði, tá hann fyri stuttum varð settur sum venjari, og útsøgnin verður eisini undirstrikað av, at hópurin hesa ferð er hin minsti, sum Svimjisambandið hevur sent til oyggjaleikir.

## Formligir trupulleikar

Loysunarorðið til trupulleikan við breiddini er fyrst og fremst langtíðar tilrættisleggjan, og tað er so ikki nakað, sum íðkararnir fáa nýtt til serliga nógv á Isle of Man komandi vikuna.

Her ræður um at fremja góð avrik alt fyri eitt, men eisini á hesum økinum hava Føroyar rent seg í ein trupulleika, sum tó er av meira formligum slag.

Tað var nevnliga soleiðis, at freistin fyri tilmeldan til Oyggjaleikirnar var úti 1. mei, og fyri svimjingina var støðan soleiðis, at FM-kappingin ikki var á skránni fyrr enn eina viku eftir hetta.

Tískil var tilmeldanin í stóran mun bygd á gitingar um, hvussu svimjararnir fóru at standa seg, og hóast Svimjisambandið royndi at leingja freistina, so lat hetta seg ikki gera. Tó fingu tey borið so í bandi, at onkrar kappingargreinar kundu skiftast millum svimjarar, sum longu vóru tilmeldaðir, men longri enn hetta slapst ikki.

Fyri úrslitini á Oyggjaleikunum og eisini fyri framtíðar áhugan fyri svimjing má vónin tí verða, at hetta ikki kemur at ávirka avrikini hjá føroysku svimjarunum skeivan vegin. Verða avrikini eins góð, og tey vóru seinast, kann hugsast, at áhugin økist og framtíðin harvið aftur gerst bjartari.

### Heiðursmerki í Svimjing á Gotlandi ‘99

| | | |
|---|---|---|
| Gull: | Eivind Eysturoy | 50 m firvald |
| | Dia Jacobsen | 50 m firvald |
| | Liðkapping | 4X50 m frí |
| Silvur: | Heini Rasmussen | 50 m frí |
| | Kristian Martin Joensen | 200 m bringu |
| | Kristian Martin Joensen | 200 m blandað |
| | Kristian Martin Joensen | 400 m blandað |
| | Liðkapping | 4X100 m frí |
| Bronsa: | Asbjørn Hansen | 50 m bringa |
| | Dia Jacobsen | 50 m rygg |
| | Bogi Lenvig | 1.500 m frí |
| | Liðkapping | 4X100 m frí |


Dia Jacobsen


Eivind Eysturoy


Asbjørn Hansen


Bára Joensen


Shaila Millum Garðarnar


Karin Gaardlykke

